# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 04.11.2025 |
| Mál nr.: | 24/28244 |
| Málsviðgjørt: | ABD/SSJ |
| Ummælistíð: | 02.09.2025 – 29.09.2025 |
| Eftirkannað: | 08.10.2025 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin), løgtingslóg um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyriskipanin) og løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin)**
(Fylgibroytingar í sambandi við, at nýggj ársroknskaparlóg verður sett í gildi o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin), sum broytt við § 4 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 28 frá 26. mars 2012, løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015, løgtingslóg nr. 51 frá 4. mai 2021, § 12 í løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, og § 18 í løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 1 a, stk. 1, nr. 4-6 verða orðað soleiðis:
"4) Smáar fyritøkur: Fyritøkur, sum lúka støddarmørkini í § 7, stk. 2, nr. 1 í ársroknskaparlógini, sbr. § 7, stk. 3 og 4 og § 131, stk. 3 og 4 í ársroknskaparlógini.
5) Miðalstórar fyritøkur: Fyritøkur, sum lúka støddarmørkini í § 7, stk. 2, nr. 2 í ársroknskaparlógini, sbr. § 7, stk. 3 og 4 og § 131, stk. 3 og 4 í ársroknskaparlógini.
6) Stórar fyritøkur: Fyritøkur, sum ikki eru smáar ella miðalstórar fyritøkur sambært § 7, stk. 2, nr. 3 í ársroknskaparlógini, sbr. § 7, stk. 3 og 4 og § 131, stk. 3 og 4 í ársroknskaparlógini."

**2.** § 1 a, stk. 2 og 3 verða strikað.

**3.** Í § 3, stk. 3 verður "nr. 5" broytt til: "nr. 6".

**4.** Í § 3, stk. 4 verður "nr. 5" broytt til: "nr. 6".

**5.** Í § 3, stk. 5 verður "nr. 6" broytt til: "nr. 7".

**6.** Í § 7, stk. 1 verður "ella 6" broytt til: "ella 7".

**7.** Í § 7, stk. 2, 1. pkt. verður "nr. 6" broytt til: "nr. 7".

**8.** Í § 9, stk. 2, 2. pkt. verður "og 6" broytt til: "og 7".

**9.** Í § 16, stk. 1, 2. pkt. verður "§ 135, stk. 1, 2. pkt." broytt til: "§ 158, stk. 1, 2. pkt."

**10.** Í § 42, stk. 1, 1. pkt. verður "bót" broytt til: "sekt".

**11.** Í § 42, stk. 6, 1. pkt. verður "bót" broytt til: "sekt".

**12.** § 42, stk. 9, 1. pkt verður orðað soleiðis:
"Sektir, ið verða álagdar sambært stk. 1 ella 6, kunnu innheintast við panting."

**13.** § 42 b, stk. 4 verður orðaða soleiðis:
"*Stk. 4.* Sektir, ið verða álagdar sambært stk. 1, kunnu innheintast við panting."

**§ 2**

Í løgtingslóg nr. 50 frá 4. mai 2021 um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyriskipanin) verður § 2, nr. 2 orðað soleiðis:
"2) Løgtingslóg um ársroknskapir og samtaksroknskapir".

**§ 3**

Í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016, § 1 í løgtingslóg nr. 44 frá 26. apríl 2019, § 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, § 1 í løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021, § 11 í løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, § 20 í løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023 og § 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 26. mars 2024, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 42 a, stk. 1 verður "Kapitalfelagsins" broytt til: "Partafelagsins".

**2.** Í § 66, stk. 1, 3. pkt. verður "kapitalfelagnum" broytt til: "partafelagnum".

**3.** Í § 165, stk. 1, nr. 2 verður "§§ 35 a og 35 b" broytt til: "§§ 38 og 39".

**4.** Í § 225, stk. 1, nr. 8, verður "lúkast." broytt til: "lúkast, ella".

**5.** § 268, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Kapittul 3 um stovnan, kapittul 10 um at hækka kapitalin, kapittul 11 um frágongd av kapitali og kapittul 14 um at avtaka kapitalfelagið verður ikki at nýta í sambandi við eina kloyving, uttan so, at tað er ásett í reglunum um kloyving, sbr. §§ 254-270."

**6.** Í § 302, stk. 1, nr. 3 verður "§§ 143 og 144" broytt til: "§§ 174 og 175".

**7.** § 303 verður orðað soleiðis:

"**§ 303.** Um serlig samfelagsáhugamál tala fyri hesum, kann landsstýrisfólkið áseta reglur um, at reglurnar fyri partafeløg og serligu reglurnar fyri landspartafeløg í hesi løgtingslóg og í ársroknskaparlógini, sbr. tó §§ 304 og 305 í hesi løgtingslóg, verða at nýta fyri landspartafeløg sambært § 5, nr. 26."

**§ 4**

*Stk. 1.* Løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2026 við virknaði fyri roknskaparár, sum byrja 1. januar 2026 ella seinni, sbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* § 1, nr. 3-13 koma í gildi dagin eftir, at løgtingslógin er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í sambandi við at uppskot til ársroknskaparlóg er fyrireikað og verður lagt fyri Løgtingið til viðgerðar er hetta uppskotið fyrireikað, og leggur tað upp til, at fylgibroytingar verða gjørdar í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, løgtingslóg um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga og løgtingslóg um parta- og smápartafeløg.

Nakrar av broytingunum í nevndu lógum eru av lógartekniskum slagi í sambandi við, at ásetingar í ársroknskaparlógini fáa nýtt nummar.

Grannskoðaraøkið og vinnufelagaøkið eru undir tættari altjóða regulering og regulering í ES. Lóggávan í Føroyum og í grannalondunum á hesum øki er tí rættiliga eins.

Í altjóða lóggávu verða sett krøv til ársroknskapirnar og til grannskoðan av ársroknskapum, og vinnufelagaøkið verður sum heild regulerað í ES-lóggávu og samsvarandi altjóða krøvum. Á ES-stigi verður í stóran mun regulerað við direktivum, sum skulu útinnast við lóggávu í limalondunum.

Í vinnuni hevur tað verið eitt ynski, og tað hevur eisini verið breið politisk semja um, at føroyska vinnufelagalóggávan, grannskoðaralógin og ársroknskaparlógin skulu fylgja ES-reglum og altjóða reglum á økinum.

Hvat grannskoðaravinnuni í Føroyum viðvíkur er støðan hon, at skulu føroyskir grannskoðarar og grannskoðanarfyritøkur framhaldandi kunna átaka sær uppgávur fyri føroyskar fyritøkur, sum virka á altjóða stigi (t.e. fíggjarfyritøkur og fyritøkur, ið eru skrásettar á virðisbrævaskálum) má lóggávan dagførast samsvarandi altjóða gongdini.

Lóggávan á økinum t.e. grannskoðaralógin, vinnufelagalóggávan og ársroknskaparlógin o.a. eru tætt tengdar at hvørjari aðrari. Tað merkir, at tá broytingar verða gjørdar í einari lóg á hesum økinum, so førir tað við sær, at broytingar eisini mugu gerast í aðrari lóggávu á økinum. Tí verður skotið upp, at hetta uppskotið við fylgibroytingum verður lagt fyri Løgtingið og viðgjørt í Løgtinginum samstundis sum uppskotið til løgtingslóg um ársroknskaparlóg.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðaravirkir (Grannskoðaralógin), løgtingslóg um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga og løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin).

Grannskoðaralógin ásetir grundleggjandi reglurnar fyri grannskoðaravirksemi, heruppií um góðkenning av grannskoðarum, krøv til grannskoðan av ársfrásøgnum hjá fyritøkum og fyritøkum av almennum áhuga, eftirlit, o.m.a. Harumframt eru nakrar serligar reglur ásettar í serstakari løgtingslóg um grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga, t.e. peningastovnar, tryggingar- og eftirlønarfeløg umframt fyritøkur, sum eitt nú eru skrásettar á einari virðisbrævamiðstøð/keypsskála.

Vinnufelagalógin ásetir grundleggjandi reglur um kapitalfeløg, heruppií í mun til skráseting, broyting í skrásettu viðurskiftunum, atkvøðureglur, samanlegging, kloyving, avtøku, o.m.a.

Galdandi lóggáva er tætt knýtt uppat reglunum í ársroknskaparlógini. Hetta í høvuðsheitinum tí, at ársroknskaparlógin ásetir, at kapitalfeløg sambært vinnufyritøkulógini á hvørjum ári skulu gera eina ársfrásøgn, heruppií ein ársroknskap, sum skal lúka ávís krøv, sum nærri ásett í ársroknskaparlógini, og eru meginparturin av teimum roknskaparskyldugu fyritøkunum

kapitalfeløg, sum eru skrásett sambært vinnufelagalógini. Eisini er grannskoðaralóggávan viðkomandi, í høvuðsheitinum tí, at ársfrásagnirnar hjá nógvum vinnufyritøkum, heruppií hjá øllum fyritøkum, sum røkka ávís støddarmørk sambært ársroknskaparlógini, skulu grannskoðast av einum góðkendum grannskoðara. Yvirskipað ber til at siga, at vinnufelagalóggávan, ársroknskaparlóggávan og grannskoðaralóggávan í felag hava til endamáls at tryggja álit á, og ávíst eftirlit við vinnurekandi fyritøkum, tó soleiðis, at nøkur almenn krøv verða sett til allar fyritøkur, og eitt sindur fleiri krøv verða sett til miðalstórar, stórar fyritøkur og børsskrásettar fyritøkur.

Tá ið skotið verður upp, at nýggj ársroknskaparlóg verður sett í gildi, verður tað eisini mett neyðugt at gera nakrar fylgibroytingar (konsekvensbroytingar) í aðrari lóggávu. Í hesum sambandi eru eisini gjørdar nakrar ritstjórnarligar og málsligar broytingar/rættingar, ið ikki neyðturviliga beinleiðis kunnu knýtast upp at uppskotinum til nýggja ársroknskaparlóg, men sum kortini verða mettar skynsamar at gera, til dømis uppskotna rættingin í § 3, nr. 6.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Yvirskipað er endamálið við uppskotinum at tryggja, at føroysk lóggáva á økinum er á sama støði sum lóggávan í londum, sum vit vanliga samanbera okkum við, heruppií serliga ES- og EBS-londini.

Onkrar av broytingunum í hesum uppskotinum eru smærri lógartøkniligar broytingar orsakað av, at vit fáa eina nýggja ársroknskaparlóg, og í øðrum førum er talan um meiri umfatandi broytingar, sum tó hanga saman við broytingunum í ársroknskaparlógini.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Í sambandi við at uppskot til ársroknskaparlóg er fyrireikað og verður lagt fyri Løgtingið til viðgerðar er hetta uppskotið fyrireikað, og leggur tað upp til, at fylgibroytingar verða gjørdar í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, løgtingslóg um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga og løgtingslóg um parta- og smápartafeløg.

Nakrar av broytingunum í nevndu lógum eru av lógartekniskum slagi í sambandi við, at ásetingar í ársroknskaparlógini fáa nýtt nummar.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Advokatfelag Føroya, Vinnuhúsinum, Skráseting Føroya, Grannskoðaraeftirlitinum, Tryggingareftirlitinum, TAKS, Fíggjarmálaráðnum, P/F Atlantic Petroleum, P/F Bakkafrost, Felagið Føroyskir Peningastovnar, Finanstilsynet og hjá føroysku peningastovnunum

Harumframt hevur uppskotið ligið frammi á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum og á ummælisportalinum.

#### 1.5.1. Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Felagið Føroyskir Grannskoðarar hevur ongar viðmerkingar til hetta uppskot.

Ongar aðrar viðmerkingar vóru til uppskotið (t.e. fylgibroytingarnar og ritstjórnarligu rættingarnar í grannskoðaralógini, vinnufelagalógini, o.a.).

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landið ella fyri kommunurnar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri landið ella kommunurnar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar við sær fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógarppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri eitt ávíst øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðing fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið er ikki í ósamsvar við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

### 2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld

### 2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjald.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Eftir galdandi § 303 í vinnufelagalógini, kann landsstýrisfólkið seta ávísar serligar reglur í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini í gildi fyri landspartafeløgini. Higartil hevur hendan heimild ikki verið nýtt.

Lógaruppskotið leggur ikki fleiri heimildir til landsstýrisfólkið ella stovnar undir landsstýrinum, men nevnda heimild verður varðveitt.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

*§ 1, nr. 1*
Í § 1 a, stk. 1 í grannskoðaralógini verða hugtøk í lógini nágreinað. Í ásetingunum í § 1 a, stk. 1, nr. 4-6 verða hugtøkini smáar, miðalstórar og stórar fyritøkur nágreinað. Hugtøkini eru nágreinað samsvarandi tí, ið er ásett í § 7, stk. 2, nr. 1-3 í galdandi ársroknskaparlóg, sbr. § 7, stk. 3 og 4, og § 110, stk. 3 og 4 í somu lóg.

Nú nýggj løgtingslóg um ársroknskap er fyrireikað verður neyðugt at orða ásetingina í § 1 a, stk. 1, nr. 4-6 av nýggjum.

Skotið verður upp at orða § 1 a, stk. 1, nr. 4-6 av nýggjum soleiðis, at nágreiningin av smáum, miðalstórum og stórum fyritøkum er við tilvísing til § 7, stk. 2 í uppskotinum til ársroknskaparlóg. Hetta er eitt uppskot til fylgibroyting í sambandi við uppskotið til nýggja ársroknskaparlóg.

Skotið verður í stk. 1, nr. 4 upp, at "smáar fyritøkur" verður nágreinað sum fyritøkur, ið lúka støddarmørkini í § 7, stk. 1, nr. 1 í uppskotinum til ársroknskaparlóg.

Skotið verður í stk. 1, nr. 5 upp, at "miðalstórar fyritøkur" verður nágreinað sum fyritøkur, ið lúka støddarmørkini í § 7, stk. 2, nr. 2 í uppskotinum til ársroknskaparlóg.

Skotið verður í stk. 1, nr. 6 upp at "stórar fyritøkur" verður nágreinað sum fyritøkur, ið lúka støddarmørkini í § 7, stk. 2, nr. 3 í uppskotinum til ársroknskaparlóg.

Broytingin í stk. 1, nr. 4-6 hevur við sær, at nágreiningin av hugtøkunum í grannskoðaralógini svarar til nágreiningina av somu hugtøkum í ársroknskaparlógini.

*Til § 1, nr. 2*
Sambært galdandi áseting í § 1 a, stk. 2 í grannskoðaralógini er ásetingin í § 7, stk. 3 og 4 í ársroknskaparlógini galdandi, sbr. tó § 1 a, stk. 3 í grannskoðaralógini, tá støddirnar fyri smáar og miðal fyritøkur verða roknaðar eftir § 1 a, stk. 1, nr. 4 og 5.

Eftir galdandi áseting í § 1 a, stk. 3 verður fíggjarjavni, nettoumsetningur og miðaltal av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum, sbrt. stk. 1, nr. 4 og 5 roknað á tann hátt, at fíggjarjavni, nettoumsetningur og talið av heiltíðarsettum starvsfólkum hjá móðurfyritøkuni og dótturfyritøkuni verður lagt saman, og er § 110, stk. 2 og 3 í ársroknskaparlógini galdandi í hesum sambandi.

Skotið verður upp, at § 1 a, stk. 2 og 3 verða sett úr gildi. Orsøkin til hetta er, at § 1, nr. 1 í lógaruppskotinum, sum snýr seg um broyting av § 1 a, stk. 1, nr. 4-6 í grannskoðaralógini, førir við sær, at tørvur ikki longur er á ásetingunum í stk. 2 og stk. 3 í § 1 a. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 1 í uppskotinum.

*Til § 1, nr. 3, 4 og 5*

Broytingar vórðu gjørdar í grannskoðaralógini í 2023 við løgtingslóg nr. 31 frá 29. mars 2023. Tá bleiv eitt nýtt nr. 4 ásett í § 3, stk. 1 í grannskoðaralógini.

Ongar konsekvensbroytingar vórðu í tí sambandi gjørdar í § 3, stk. 3, 4 og 5 í grannskoðaralógini. Hetta var ein feilur, og verða hesar broytingar nú gjørdar.

Í § 3, stk. 3 í grannskoðaralógini verður víst til § 3, stk. 1, nr. 5 í lógini. Hetta eigur at vera § 3, stk. 1, nr. 6, og tað verður nú rættað.

Í § 3, stk. 4 í grannskoðaralógini verður víst til § 3, stk. 1, nr. 5 í lógini. Hetta eigur at vera § 3, stk. 1, nr. 6, og tað verður nú rættað.

Í § 3, stk. 5 í grannskoðaralógini verður víst til § 3, stk. 1, nr. 6 í lógini. Hetta eigur at vera § 3, stk. 1, nr. 7, og verður tað nú rættað.

*Til § 1, nr. 6 og 7*
Í § 7, stk. 1 og í § 7, stk. 2, 1. pkt. verður "6" broytt til "7".

Tilvísingin í galdandi § 7, stk. 1 og í § 7, stk. 2, 1. pkt. til § 3, stk. 1, nr. 6 er ein feilur. Rætta tilvísingin í ásetingunum skal vera § 3, stk. 1, nr. 1-3 ella 7.

Stig verða nú tikin til at rætta hendan feilin, sum er ikomin, tá grannskoðaralógin varð broytt í 2023 við løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023 um broyting í ymsum løgtingslógum o.tíl. í sambandi við dagføring av konkurslógini fyri Føroyar.

Í § 7 í grannskoðaralógini eru treytirnar ásettar fyri, nær ein góðkenning kann fella burtur. Góðkenningin kann sambært galdandi orðing fella burtur, um treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1-3 ella 6 ikki longur eru loknar. Sum nevnt, so er tilvísingin til § 3, stk. 1, nr. 6 ikki røtt, tí hetta skal vera § 3, stk. 1, nr. 7.

Í § 3, stk. 1, nr. 7 er krav ásett um, at grannskoðari skal vera tryggjaður móti fíggjarligum krøvum, sum kunnu standast av at fremja uppgávur sambært § 1, stk. 2 og 3 í grannskoðaralógini.

Tá hendan broyting kemur í gildi fer tað aftur at ganga greitt fram av § 7, stk. 1 í grannskoðaralógini, at ein góðkenning sum grannskoðari fellur burtur í tí løtu, tá ein av grundunum fyri burturfalli er til staðar, og tær eru: Bústaður (§ 3, stk. 1, nr. 1), myndugur (§ 3, stk. 1, nr. 2), endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð (§ 3, stk. 1, nr. 3) ella trygging (§ 3, stk. 1, nr. 7).

Somuleiðis førir broytingin við sær, at tað aftur verður greitt ásett í § 7, stk. 2 í grannskoðaralógini, at grannskoðari fyri Skráseting Føroyar skal skjalprógva, at hann er tryggjaður sambært § 3, stk. 1, nr. 7 í lógini.

*Til § 1, nr. 8*
Í § 9, stk. 2, 2. pkt. verður "6" broytt til "7".

Ásetingin í § 9 í grannskoðaralógini snýr seg um avleiðing av burturfalli av góðkenning. Í § 9, stk. 1, nr. 2 er ásett, hvørjar treytirnar eru fyri at ein góðkenning kann verða sett í gildi

aftur av nýggjum eftir, at hon er burturfallin, frátikin ella frádømd. Sambært ásetingini skulu m.a. treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1-3 og 6 í grannskoðaralógini vera loknar.

Tilvísingin til § 3, stk. 1, nr. 6 er ein feilur. Stig verða nú tikin til at rætta hetta, so tað frameftir verður víst til § 3, stk. 1, nr. 7. Tað merkir, at tað nú aftur verður púra greitt ásett, at kravið um trygging í § 3, stk. 1, nr. 7 skal vera lokið.

Feilurin í galdandi áseting íkomin, tá grannskoðaralógin varð broytt í 2023 við løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023 um broyting í ymsum løgtingslógum o.tíl. í sambandi við dagføring av konkurslógini fyri Føroyar.

*Til § 1, nr. 9*

Nú nýggj løgtingslóg um ársroknskap er fyrireikað verður neyðugt at broyta ásetingina í § 16, stk. 1, 2. pkt. soleiðis, at tilvísingin til § 135, stk. 1, 2. pkt. í ársroknskaparlógini verður broytt til § 158, stk. 1, 2. pkt. í ársroknskaparlógini.

Sostatt er talan um eina broyting, ið má gerast nú ásetingarnar í ársroknskaparlógini fáa nýggj nummur. Broytingin hevur ikki við sær broytingar annars í innihaldinum í ásetingini.

*Til § 1, nr. 10-13*
Í ásetingunum í § 42, stk. 1, 1. pkt, § 42, stk. 6, 1. pkt., § 42, stk. 9 og § 42 b, stk. 4 verður hugtakið "bót" ella "bøtur" brúkt. Rætta hugtakið er "sekt". Skotið verður nú upp at broyta hetta, so tað frameftir verður "sekt",

**Til § 2**
*Til § 2, nr. 1*

Í § 2, stk. 1, nr. 2 í lógini verður víst til "Anordning om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven". Av tí, at løgtingslóg um ársroknskap eftir ætlan skal koma í gildi í næstum, og at anordning om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven samstundis fer úr gildi, er neyðugt at gera eina fylgibroyting í ásetingini.

**Til § 3**
*Til § 3, nr. 1 og 2*
Talan er um rætting av feili í ávikavist § 42 a, stk. 1 og 2 og í § 66, stk. 1, 3. pkt. í vinnufelagalógini, har tað er komið bland í hugtøkini "kapitalfelag" og "partafelag". Í báðum førum verður "kapitalfelagsins" broytt til "partafelagsins".

*Til § 3, nr. 3*

Talan er um eina fylgibroyting orsakað av, at nýggj ársroknskaparlóg verður sett í gildi. Ásetingin í § 165, stk. 1, nr. 2 í vinnufelagalógini hevur eina tilvísing til §§ 35 a og 35 b í ársroknskaparlógini, og av tí, at hesar ásetingar fáa nýtt nummar nú nýggj ársroknskaparlóg verður sett í gildi má broytingin gerast. Innihaldið broytist annars ikki.

*Til § 3, nr. 4*

Broytingin snýr seg um at gera eina rætting í § 225, stk. 1, nr. 8 í vinnufelagalógini. Tað er ein feilur í galdandi § 225, stk. 1, nr. 8, tí ásetingin endar við einum punktum, har ásetingin eftir ætlan skuldi enda við "ella". Hetta verður nú rættað í ásetingini.

*Til § 3, nr. 5*

Ásetingin um kloyving í § 268 í vinnufelagalógini bleiv broytt í 2019 við løgtingslóg nr. 44 frá 26. apríl 2019. Í sambandi við hesa broytingina er ein feilur komin í.

Í upprunaligu vinnufelagalógini frá 31. mai 2011 er ásetingin í tágaldandi § 268, stk. 4 rætt orðað. , og hevur partin um kapitallækkan við í ásetingini. Ásetingin var soleiðis orðað:

*"Stk. 4.* 3. kapittul um stovnan verður ikki at nýta, um eitt nýtt kapitalfelag verður skapað sum liður í eini kloyving uttan so, at hetta sæst í reglunum í §§ 254-270. 10. kapittul um kapitalhækkan verður ikki at nýta fyri eina kapitalhækkan í móttakandi kapitalfelagnum við støði í ognum og skyldum hjá innskjótandi kapitalfelagnum. 11. kapittul um frágongd av kapitali og 14. kapittul um avtøku verða ikki at nýta, um tað, sum liður í eini kloyving, fer fram ein kapitallækkan í innskjótandi felagnum ella ein avtøka av hesum kapitalfelagi.*"*

Í sambandi við lógarbroytingarnar í vinnufelagalógini í 2019 bleiv § 268, stk. 4 broytt til at vera stk. 5, og ásetingin bleiv umorðað. Við broytingini hendi tað, at tað í ásetingini ikki longur verður víst til 11. kapittul um frágongd av kapitali. Mett verður, at tað er ein feilur, at 11. kapittul um frágongd av kapitali er strikað úr ásetingini.

Onki í viðmerkingunum til lógarbroytingina í 2019 bendir á, at ætlanin var at kapitallækkan ikki skuldi vera við. Mett verður, at orðingin er dottin burtur av misgáum.

Tí verða stig nú tikin til at fáa hetta rættað í § 268, stk. 5, so tað aftur verður greitt ásett, at kapittul 3 um stovnan, kapittul 10 um at hækka kapitalin, kapittul 11 um frágongd av kapitali og kapittul 14 um at avtaka kapitalfelagið verða ikki at nýta í sambandi við eina kloyving uttan so, at tað skilst á ásetingunum um kloyving, sbr. §§ 254-270.

*Til § 3, nr. 6*

Talan er um eina fylgibroyting orsakað av, at nýggj ársroknskaparlóg verður sett í gildi. Í galdandi § 302, stk. 1, nr. 3 í vinnufelagalógini verður víst §§ 143 og 144 í ársroknskaparlógini, og av tí, at hesar ásetingar fáa nýtt nummar nú nýggj ársroknskaparlóg verður sett í gildi má broytingin gerast. Innihaldið broytist annars ikki. Skotið verður upp, at ásetingin verður broytt, so víst verður til §§ 174 og 175 í ársroknskaparlógini.

*Til § 3, nr. 7*

Í § 303 í vinnufelagalógini eru gjørdar nakrar ritstjórnarligar broytingar, heruppií at "landsstýrismaðurin" verður broytt til "landsstýrisfólkið" og at tilsipanin til kongligu fyriskipanina verður tikin burtur, nú skotið verður upp, at nýggj ársroknskaparlóg verður sett í gildi við løgtingslóg.

Broytingarnar eru ritstjórnarligar, og hava tískil ikki innihaldsligan týdning í mun til galdandi rættarstøðu.

Um galdandi § 303 í vinnufelagalógini, sum verður førd víðari við hesum uppskoti, kann viðmerkjast, at byrjanarstøði í ársroknskaparlógini og vinnufelagalógini er, at fleiri av teimum somu krøvum, sum verða sett feløgum, sum eru skrásett á einum virðisbrævamarknaði/keypsskála, eisini verða sett feløgum, sum Føroya landsstýri eigur (landspartafeløgini), heruppií í mun til krav um hálvársfrásøgn, upplýsingar í ársroknskapinum, o.a.

Ásetingin í § 303, sum er eldri enn upprunaliga vinnufelagalógin frá 2010, hevur til endamáls at tryggja, at nevndu reglur kortini einans koma í gildi, um landsstýrisfólkið ásetir hetta í kunngerð, og er tað ikki gjørt higartil. Orsøkin til, at hetta ikki er gjørt er, at fleiri landspartafeløg eru smá ella hava lítið virksemi, og at krøvini til feløg, sum eru skrásett á

virðisbrævamarknaði/keypsskála undir øllum umstøðum mugu haldast at vera rættiliga umfatandi. Um reglurnar verða settar í gildi, so kann hetta merkja, at landspartafeløgini skulu víðka teirra umsiting munandi til tess at kunna lúka krøvini.

**Til § 4**
Gildiskomuáseting. Skotið verður upp, at uppskotið kemur í gildi 1. januar 2026 við virknaði fyri roknskaparár, sum byrja 1. januar 2026 ella seinni, og svarar hetta til gildiskomuásetingina sambært uppskotinum til nýggja ársroknskaparlóg. Tó verður skotið upp, at broytingarnar í grannskoðaralógini (§ 1, nr. 3-14) koma í gildi dagin eftir, at løgtingslógin er kunngjørd.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 04. november 2025

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur